tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 48 hósdagur 9. mars 1995 69. árgangur Krónur 7,00

**Kendur bretskur jarðfrøðingur um olju í føroysku undirgrundini:**

# OLJUFELØGINI BÍÐA NÚ EFTIR FØROYINGUM



*»Seismiska tíðarætlanin hjá føroysku oljumyndugleikunum í sambandi við oljukanningarnar er góð, men tá talan er um eina petroleumslóg, ið fevnir um loyvi og annað, mugu føroyingar fáa hana gjørda,« sigur kendi bretski jarðfrøðingurin, Brian Evamy. »Ikki fyrr enn hon er komin, kunnu stóru oljufeløgini fara undir at gera tær stóru íløgurnar.«*

**síðurnar 12 & 13**

# Eldur físti úr málaranum

síða 9

*Eldur var í húsum við Velbastaðvegin í gjár*



**Næsta takið hjá okkum:**

# Ongan toll á royktum fiski til ES-marknaðin

síða 8

*Royndur bretskur jarðfrøðingur um olju í føroysku undirgrundini:*

# Eg eri bjartskygdur

*Tað er avgjørt vert at kanna, um olja og gass er í føroysku undirgrundini. Seismiska tilfarið frá Western vísir, at basaltið norðan og vestan fyri Føroyar er so tjúkt, at har kann ein avskriva møguleikan at finna olju. Men økini sunnan og eystan fyri - millum Føroyar og Hetland eru áhugaverd sigur bretski jarðfrøðingurin Brian Evamy, sum í hesum døgum vitjar í Føroyum.*

*Hann heitir tó á føroyingar um ikki tupp á forhond at taka sum givið, at olja er her. -Latið okkum fyrst sleppa at gera okkara heimaarbeiði. Tá tað er gjørt ber til at siga nakað meira ítøkiligt.*

Felagið Føroya Oljuídnaður skipaði í gjár fyri áhugaverdum skeiði á Hotel Føroyum við ikki færri enn 70 luttakarum úr øllum landinum. Á skeiðnum høvdu fólk m.a. høvi at hoyra, hvat ein av teimum royndu og garvaðu jarðfrøðingunum í bretsku oljuvinnuni hevði at siga um nýggja oljuøkið millum Føroyar og Hetland.

Brian Evamy hevur arbeitt í oljuvinnuni sum jarðfrøðingur í meira enn 35 ár. Meginpartin av tíðini hevur hann arbeitt fyri Shell, síðani nakað fyri BP men í dag starvast hann hjá oljufelagnum Enterprise í London.

Brian Evamy hevur verið við í oljuleiting bæði í fjareystri og í Norðsjónum. Hann hevur drúgvar royndir og í dag tekst hann m.a. við kanningunum av føroysku undirgrundini.




## LOYSA ÚR LAGDI

Vit hava ikki bert alt til stokkarnar, baldýringina og annað handarbeiði, men eisini hóp av hentleikum til allar partar av tøtingini – eitt nú:




***Vælkomin inn á gólvið at síggja okkara fjølbroytta úrval umframt alt tað nógva, vit kunnu útvega.***

Tógvhandilin
igloo

Tógvhandilin
**IGLOO**
Sverrisgøta 19
Tórshavn
Tlf. 15264
Fax. 19623


**Trý oljufeløg saman**

Tey trý oljufeløgini Enterprise, Mobil og Statoil stovnaðu herfyri ein samstarvsbólk við tí fyri eygað at bjóða seg fram at gera kanningar á føroyskum øki. Her er talan um trý feløg, sum longu arbeiða vestan fyri Hetland. Tey hava tí nógva vitan og royndir at arbeiða í undirgrund, sum møguliga ikki víkir seg nógv frá tí føroysku undirgrundini.

Á skeiðnum greiddi Brian Evamy føroyingum frá, hvussu olja verður til og hvussu jarðfrøðingar og aðrir finna fram til oljukeldurnar.

Fyri fyrstu ferð nakrantíð vóru eisini tær fyrstu seismisku upptøkurnar frá føroyska økinum vístar fram alment. Luttakararnir á skeiðnum høvdu høvi til at síggja seismisk kort, sum vísa undirgrundina.

**Áhugaverdir upplýsingar**

Eftir fyrilesturin spurdi Sosialurin Brian Evamy, hvussu vónirnar eru fyri at finna olju í føroysku undirgrundini.

-Eg kann siga so mikið, at dygdin á seismisku upptøkunum er góð. Hvat vit síggja er enn ov tíðliga at tosa ítøkiliga um, men vit síggja løg undir basaltinum, (subbasalt leads) sum eggja okkum til at halda fram við kanningunum og tulkingini av seismikkinum.

Brian Evamy vil fegin hava, at føroyingar ikki upp á forhond taka sum givið, at olja finst í undirgrundini. Hann heldur, at føroyingar eiga ikki at leypa fram av soleiðis kanningarnar fara fram og vísir á, at vit heldur ikki mugu gloyma, at talan er um sera stór dýpi upp á meira enn 900 metrar, har komandi oljupallar skulu arbeiða. Í hesum sambandi fer tað altíð at vera ein spurningur um, hvat loysir seg búskaparliga.

-Eg skal ikki taka vónina frá nøkrum, men enn er tað ov tíðliga at siga nakað við vissu, hvat viðvíkur olju og gassi í undirgrundini. Vit mugu í hvussu so er sleppa at gera okkara heimaarbeiði, áðrenn vit kunnu siga nakað meira ítøkiligt. Tá vit hava gjørt tað vilja vit so taka tær neyðugu avgerðirnar um, hvat vit skulu gera framyvir, og sum kann gagna bæði ídnaðinum og Føroyum.

*-Nógvir føroyingar trúgva blint upp á, at tað er olja í undirgrundini. Hvat vilt tú siga við teir?*

-At her enn er eitt sera stórt arbeiði eftir at gera, áðrenn henda trúgvin kann verða váttað ella avsannað.

**Boripall á føroyskum øki í fyrsta lagi í 1998**

Vit spurdu Brian Evamy nær vit í fyrsta lagi kunnu rokna við at hava ein boripall á føroyskum øki!

-Tað verður eina og aleina ein komandi føroysk petroleumslóggáva at avgera. Tá hon er komin upp á pláss skal tú rokna við at brúka eitt ár ella so til meira nágreiniligar seismiskar kanningar, áðrenn tú kanst

→

Atlantic Margin Group
Mobil
STATOIL
Enterprise Oil

